## MRCC / TR

## Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar innan fyri hesar knattstøður:

1. 63°08 N 002°10 W
2. 62°30 N 004°50 W
3. 62°10N 004°50W
4. 61°57 N 004 °42W
5. 62°35 N 001°57 W
6. 62°55 N 001°45W

Viðmerkjast skal at knattstøðurnar eru vegleiðandi.

Byrja verður umleið ................. 01.07.2009
Arbeiðið tekur væntandi ......Umleið 6 vikur.
Skipanavn......................... Harrier Explorer
Kallibókstavur.................................. 3EIE3
Heimstaður.................................. Panama
Fiskiveiðiumboð ............... Ebbe Mikkelsen
Longd á kaðali er 9000 m

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um arbeiði fáast frá Tórshavn Radio, á heimasíðuni hjá MRCC Tórshavn www.mrcc.fo, ella á telefon 351300.



## Listaframsýning á ólavsøku

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri listaframsýning í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku.

**Opið verður 28. – 30. juli.**

Hevur tú hug at taka lut í hesi framsýning, set teg í samband við Lions Club Tórshavn á telefon 213800, 734001, 211470 ella 215709 áðrenn 10. juli.

Málningar ið skulu sýnast fram, skulu handast nevndini tann 20 juli 19.00 - 21.00 í Müllers Pakkhús.

Óseldir málningar skulu avheintast aftur tann 30. juli millum 20.00 og 22.00.

Vinninurin av málningasøluni fer til vælgerandi endamál

LIONS CLUB TÓRSHAVN

NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

## Frítíðarskúlin á Svangaskarði, Toftir søkir eftir námsfrøðingi

Til Frítíðarskúlan verður søkt eftir:

- 1 námsfrøðingi at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja 01.09.2009.

Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í starv tíðaravmarkað.

Frítíðarskúlin heldur til á Brekkukletti 5, og er normeraður til 40 børn.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum
- Dentur verður lagdur á at veita børnunum eitt trygt og mennandi frítíðartilboð.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið

**Setanarviðurskiftir:**
Starvið verður sett frá 01.09.2009.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 11-17.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðarin í Frítíðarskúlanum á tlf 448786/565023

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 08.07.2009.

**NES KOMMUNA**
**650 Toftir**
**www.nes.fo**
**nes@nes.fo**

## Klinikkassistentur

Søkt verður eftir einum klinikkassistenti at byrja skjótast gjørligt.

Møguleiki er fyri upplæring.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn innan 13. juli 2009.

TANNLÆKNASTOVAN Í DALATÚNI 19
Tlf. 31 51 58
Marnar Gaard · Ísak Thomassen · Regin Eikhólm

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Námsfrøðingur til Verkhúsið Stíggj í Saltangará

Søkt verður eftir námsfrøðingi, 20 tímar um vikuni, til Verkhúsið Stíggj í Saltangará til setan 17. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:
Verkhúsið Stíggjur
Heiðavegur 37
600 Saltangará
Stílað: Poulina Johannesen, leiðara

Umsóknarfreist: 14.07.2009

Les lýsingina á heimasíðu okkara www.naerverk.fo / leys størv

**Les meira á www.naerverk.fo**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru tríggjar deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan og Stuðulstænastan. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ
Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

## Bilsmiðjur søkist

**Bilsmiðir søkjast til mekaniska verkstað okkara, at byrja eftir summarfrítíðina.**

Umsókn at senda til: Sp/F Berg Motors, att: Carsten Ottosen, Postsmoga 1039, FO–110 Tórshavn, ella teldupost: co@bergmotors.fo.

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 · Postboks 1039 · 110 Tórshavn
Tel: 31 35 35 · info@bm.fo · www.bergmotors.fo

## Tannrøktari

Søkt verður eftir avloysara fyri tannrøktarin, sum fer í barnsburðarfarloyvi í august 2009.

Er hetta nakað fyri teg, so lat okkum frætta innan 13. juli 2009.

TANNLÆKNASTOVAN Í DALATÚNI 19
Tlf. 31 51 58
Marnar Gaard · Ísak Thomassen · Regin Eikhólm